# At sigla er at sigla við seglbáti

**Á Eystaruvág í Havn liggur seglbáturin Gaia og tað eru føroyskar kvinnur, ið hava ognað sær bátin og nú hava tær siglt hann úr Danmark til Føroya. Randi Holm, ein av eigarunum sigur, at tær hava ymsar royndir innan sigling, serliga við seglbáti, og at í hennara hugaheimi er tað størsta innan sigling júst at sigla við seglbáti tá ongin motorur hurrar og segl verða sett**



*Gaia er dygdargóður bátur, ið fólk fegin vilja hava fatur á, so kvinnuligu eigararnir meta seg vera sera hepnar*

SIGLING

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*
*Myndir: D.Olsen*

Møðgurnar Randi og Turið Holm hava saman við Duritu Joensen keypt seglbát. Báturin er heimahoyandi í Danmark, men nú liggur báturin á Havnarvág.

Durita Joensen og Randi Holm hava saman við Erik Torjusen, ið er maður Duritu Holm, siglt Gaiu til Føroya.

Fyri líka at greiða lesarunum frá, so nøvn ikki koma í bland, so er søgan henda:

Erik Torjusen og Durita Holm eru kendir heimssiglarar (men hava sum so onki við Gaiu at gera). Durita Holm er í familju við Randi Holm og bæði Randi Holm og Durita Joensen hava roynt seg sum manning hjá Duritu Holm. So er tað greitt.

Um orsøkina til, at Turið og Randi og Durita hava keypt bátin sigur Randi, at tær fingu møguleikan og at tað ljóði sera spennandi. Og tá Randi spurdi mammu sína, um hon vildi verða við í keypinum, so játtaði hon.

Um teirra royndir innan sigling sigur Randi, at bæði hon og Durita hava roynt seg sum siglarar. Mest við seglbáti. Báðar hava m.a. tað í felag, at tær hava siglt við Duritu Holm.

– Mamma hevur kanska ikki tær stóru royndirnar, men hevur heimaskiparaprógv, sigur Randi.

Dreymur teirra er m.a. at sigla til Caribia og aðrastaðni, men júst nær hetta kann gerast veruleiki er ógreitt. Turið Holm kenna føroyingar sum yvirlækna og bæði Randi Holm og Durita Joensen búgva í Danmark. Randi arbeiðir innan KT hjá fyritøkuni Siemens og Durita starvast sum sjúkrarøktarfrøðingur.

### Konubátur

Tá vit mikumorgunin fara umborð og varliga banka uppá, letur Randi upp innan úr koyggjuni. Eg spyrji varliga, um tíð er til eitt prát og tað játtar Randi.

Eg rósi bátinum og innan úr koyggjuni heilsar nú Durita Holm, ið vitjar umborð.

– Pápi mín kallar bátin Umiak, ið er konubátur á grønlendskum, smáflennir Durita Holm.

Randi greiðir frá, at Gaia er ein bátur, ið er heimssiglari, sterkur og góður at sigla, hóast ferðin ikki er so nógv.

Durita Holm váttar og Randi viðmerkir, at royndi siglarin Erik Torhusen, sum sigldi við til Føroya, veruliga dámdi bátin sera væl.

– At sigla við seglbáti er at sigla, Ongan motor og at seta segl. Hetta er tað størsta innan sigling. Ein er eitt við náttúruna, hugleiður Randi, meðan hon tendrar gasskomfýrin fyri at seta kaffi útá.

– Hetta er ein klassikari, ið fólk fegin vilja hav hendur á, so vit hava verið heppin, sigur Randi.

Tann 8. august fer Gaia aftur til Danmarkar og manningin er tá Durita, Stamen og Turið, men fyrst verður ólavsøkan hildin umborð á Gaiu.



*Í skemti verður Gaia eisini nevnd Umiak, ið er konubátur á grønlendskum, tí eigararnir eru allar kvinnur*


*Sovipláss eru fyri 6 fólkum umborð á Gaiu, ið annars hevur alla hugsandi útgerð*

**FAKTA**

Gaia er 35 fót av merkinum Nicholson, ið er kent og virt enskt merki.

Byggiár: 1975
Sovipláss er til 6 fólk
26 hesta motorur av merkinum Volvo Penta
Útgerð
Millum annað sjálvstýrari, manuellur vindstýrari og elektroniskur. Sjókort, eisini elektronisk.
WC, kuldaskáp, gasskomfýrur, oljufýrur

**STUTT SAGT**

## Listaframsýning í Müllers pakkhúsi

Lions Club Tórshavn skipar aftur í ár fyri teirri vælumtóktu listaframsýningi í Müllers Pakkhúsi á Ólavsøku.

Í ár verða umleið 30 framsýnarar við og listaverkini verða omanfyri 100 í tali.

Hendan framsýning hevur vunnið sær pláss sum fastur táttur í hugaheiminum hjá fleiri ólavsøkugestum, tí talið av vitjandi veksur støðugt og vóna vit sjálvandi eisini at so verður í ár.

Seinastu árini hevur framsýningin verið í Müllers Pakkhúsi, og tað verður hon eisini í ár.

Listaframsýningin letur upp Ólavsøkuaftan 28. juli kl. 14.00

Opið er eisini Ólavsøkudag og sunnudagin 30. juli.

Latið verður upp kl. 14.00 og latið verður aftur kl. 20.00 allar dagarnar.

Atgongumerkini eru við í lutakastinum um ein málning, sum borgarstjórin í Tórshavn, Heðin Mortensen hevur málað og latið sum gávu til Lions.

Avlopið av listaframsýningini, fer eins og allur peningur, ið Lions Club letur til vælgerandi endamál.

## 32 sent uppskot inn til búmerkjakpping hjá Løgtinginum

POLITIKKUR

*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Tá freistin var úti mánadagin at luttaka í búmerkjakappingini hjá Løgtinginum, høvdu 32 fólk sent uppskot inn

Herfyri skrivaði Løgtingið út búmerkjakapping, og tá freistin var úti mánadagin, høvdu 32 fólk sent uppskot til kappingina.

Ætlanin er, at eitt búmerki skal lýsa arbeiðið og uppgávurnar hjá tinginum, og í dómsnevndini sita formansskapurin í Løgtinginum, Palli Gregoriussen, arkitektur, Ingi Joensen, grafiskur designari, og Hansina Iversen, listakvinna.

Løgtingið tilskilar sær rætt til at velja frítt, um vinnarauppskotið verður brúkt til endaliga búmerkið, og av Løgtingsskrivstovuni verður sagt, at tey vænta, at vinnarin helst verður funnin skjótt.